VIÐMERKINGAR

Samandráttur

Kristin Michelsen

VAL04

Góðu borgarar, sum tit øll vita er valskeiðið útrunnið við árslok, og væl til bý og bygdarráð verður komandi týsdag. So er tað upp til tykkum veljarar, hvønn ella hvørjar persónar tit vilja hava at manna býráðið komandi fýra árini. Nógv gomul og nógv nýggj andlit bjóða seg fram, so tað eru nógv valevnir at velja ímillum.

Skuldin hjá Tvøroyrar býráð

Sum tit øll vita, so hevur skuldin hjá Tvøroyrar býráð verið metstór. Upplýsast kann at við árslok í ár verður samlaða skuldin umleið 75. mill. krónur, hartil er at siga, at tá skuldin var uppá mesta, var hon 170. mill. krónur. Sitandi býráð hevur goldið góðar 50. mill. krónur í rentum og avdrøgum hesi fýra árini, og heldur komandi býráð somu kós við afturgjalding av lánum sum undanfarna býráð, verður skuldin bert ein góð hálv álikning um fýra ár. Upplýsast kann eisini, at likviteturin hjá Tvøroyrar býráð er góður, og rættiliga stabilur, inntøkurnar halda stand, og metingin frá Toll og Skatt fyri 2005 er eitt vet uppeftir. Men tað krevur góða figgjarstýring, tí Tvøroyrar býráð má ikki koma aftur í tað støðu, at bunkin av ógoldnum rokningum var størri enn bunkin av goldnum rokningum.

Hvat er gjørt hesi fýra árini

Fyri at taka saman um tað, ið er gjørt hesi fýra árini, kann eg nevna nøkur mál, sum eru framd í verki, hóast at góðar 50. mill. krónur eisini eru goldnar í rentum og avdrøgum hesa tíðina.

Nýggjur brunabilur er keyptur.
Økið til Delta og rundan um gjørt byggibúgvið.
Økið til Landingarmiðstøðina og rundan um gjørt byggibúgvið.
Økið við Uttara handil er við at verða liðugt.
Keypt Tangatrøðina.
Keypt part av Heiðatrøðini.
Kirkjugarðurin útbygdur.
Verkfrøðingur settur í starv.
Vatnmeistari settur í starv.
Vatnveiting løgd til Froðbiar, og nýggjur brunnur.
Vatnveiting løgd av Rananum og vestur til Sterling.
Vatnrør keypt til liðugt gerð av vatnveiting til uppsamlingsbrunn vesturi við Rangabotnsvegin.
Útibarnagarður settur á stovn.
Skúlabarnakoyring sett á stovn.
Keypt fyribils eldrasambýlið.
Vegur asfalteraður í Øravík.
Vegur asfalteraður í Froðba.
Keikantur gjørdur við gomlu kei á Drelnesi.
Økið við innara bátahylin.
Økið rundan bedingina, liðugt innan árslok í ár.
Hvítnesbrúgvin umvald.
Skift tak og klæding á ítróttarhøll og skúlum.
Keypt økið til viðkan av idnaðarøkinum á Drelnesi.

Barnaansingin

Øll, ið vilja hava barn sítt ansa á Tvøroyri, tað veri seg vøggustova, barnagarður, útibarnagarður, dagrøkt ella frítíðarskúli, kunnu næstan ynskja hvar tey vilja hava barn sítt, so annað kann ikki sigast um barnagarðsøkið á Tvøroyri, enn at tað er væl útbygt, men tað er eisini tí, at tað er beinleiðis ein kommunal uppgáva. Hesi fýra árini vit hava stýrt, er barnafrádráttur farin frá kr. 2.000,00 uppá kr. 4.500,00, ein tann hægsti barnafrádráttur í teimum sonevndu størri plássunum, hettar er fyri at fjálga um barnafamiliunar. Somuleiðis hevur Tvøroyrar býráð haft grundøkjir til sølu fyri rættiliga sámuligan prís, fyri at fáa tey ungu aftur til býin, at festa búgv.

Eldraøkið

Eldraøkið er als ikki so væl útbygt sum barnaøkið. Orsøkin til tað er, at eldraøkið er beinleiðis ein landsuppgáva burtur av. Hartil er at siga, at Tvøroyrar býráð ikki hevur slept teimum gomlu uppá fjall. Tann dagin, um tað so verður tá landsmyndugleikarnir leggja eldraøkið út til kommununar at umsita, tá verður eldraøkið raðfest frammaliga hjá býráðnum. Upplýsast kann, at Tvøroyrar býráð hevur skitsuprojekt til byggjan av sambýli, somuleiðis verður arbeitt við ætlanum um at byggja røktarheim, ella útbyggja verandi røktarheim, um so verður at eldraøkið verður lagt út.

Í heyst keypti Tvøroyrar býráð eini setthús uppá umleið 400 fermetar, sum er ein fyribils loysn til eitt sambýli, við tí fyri eyga at selja húsini aftur.

Avísir trupulleikar hava verið ímillum pensionistafelagið og býráðið, hesir trupulleikar eru loystir í sátt og semju.

Tvøroyrar býráð saman við Onnu Djurhuus hava tikið stig til at seta á stovn dagtilhald á Tvøroyri, og hevur hettar fingið stóra undirtøku, tøkk til Onnu Djurhuus fyri tað.

Hvørjar størri atlanir hevur Tvøroyrar býráð

Tvøroyri hevur altíð haft førandi fólk innan vinnu, mentan og í ítrótt, bæði í góðum og í ringum tíðum, stuðlaði av Tvøroyrar býráð, sum rætt er eftir míni meting, uttan hesi fólk var Tvøroyri fátækt innan hesi økjir, og eiga tit stóra tøkk fyri hettar.

Nøkur mál, ið samgongan ella býráðið arbeiðir við, kann eg nevna, tó vil eg leggja afturat, at summi mál eru komin longur enn onnur. Alt ber tó ikki ávøkst beinanvegin, men verður onki gjørt, so grør heldur onki.

Umboð fyri býráðið hava verið í Ruslandi, og í tí sambandið verður arbeitt við at gera fríhavn/umskipingarhavn umframt at seta oljutangar til russiskan flotan á Drelnesi, men nógvir eru um boðið. Tórshavnar býráð hevur verið frammí í fjørmiðlunum nú í eina tíð um, at alt skal gerast á Sundi, eftir ynski frá russum og nýggja felagnum hjá Árna Dam og øðrum, hettar avsannar Árni Dam blankt, og sigur, at russar koma heim seinni í hesum mána, og hava tær kommunur, ið hava áhuga, sama møguleika.

Somuleiðis hava umboð fyri Tvøroyrar býráð verið á ferðavinnumessu í Flo-rida í summar, fyri at fáa ferðamannaskip at vitja okkara vøkru bygd og vøkru oyggj, sum vit meta er eins vøkur sum bæði Vestmannabjørgini og Kirkjubøur. Vit hava gott fólk sum arbeiðir við hesum máli, men tað tekur tíð.

Gera bátahyl eystanfyri nýggju samferðsluhavnina, sambært viðlagt mynd. Ætlanin við hesum bátahyli er, at teir bátarnir vit kalla "lystfiskabátar", skulu flyta í tann nýggja bátahylin. So verða karmarnir betur hjá teimum monnunum, ið dríva vinnuligan útróður í hinum báðum bátahyljunum, her verður tonkt uppá atløguplass.

Umsókn er komin frá Deltamonnunum saman við øðrum, at byggja høvdavirki, og vil eg vegna Tvøroyrar býráð ynskja teimum vælkomnum við hesari ætlan, ið gevur fleiri arbeiðspláss.

Arbeitt verður við at gera keikant undir nýggja bygninginum hjá Landingarmiðstøðina.

Samráðingar eru ímillum Landsverk og Tvøroyrar býráð um at fáa grótið, ið kemur úr komandi bergholið ímillum Øravík og Hov, og hevur Tvøroyrar býráð fingið játtan uppá ein part av grótinum, meðan restin verður samráðst um, og hevur Tvøroyrar býráð fleiri ætlanir, hvat grótið skal brúkast til, millum annað at fylla økið ímillum nýggju samferðsulhavnina og Drelnes út.

Svimjihylur og fótbóltsvøllur

Eitt av valevnunum hjá sambandsflokkinum fordi fram í einari grein, um eina ætlan, ið ávísir býráðslimur høvdu við at byggja svimjihyl og fótbóltsvøll, og meinti greinskrivarin, at hettar var bara søgur ella nærum ørðskapur. Nú veit eg ikki, hvat ávísir býráðslimur hava sagt umhettar málið, men eg kann siga somikið til greinskrivarin og tit sum vara av ítróttinum á Tvøroyri, at hettar er ikki bara søgur, hetta er ein ætlan sum kann gerast verðuleiki einaferð í komandi valskeiðið, skitsuprojekt er gjørt av hesari ætlan. Vilja býráðið og ítróttarfeløg her á plássinum taka lógvatøk saman, so verður hendan ætlan sum sagt veruleiki einaferð í komandi valskeiðið.

Miðbýur og mentunarhús

Tvøroyrar býráð hevur kannað hvussi ein framtíðar miðbýur skal sígga út á Tvøroyri, hettar verður ikki í næstu ár, men tíggju til tjúgu ár fram í tíðina, og arbeiðir fólk við hesari ætlan.

Somuleiðis arbeiðir A/S T. F. Thomsen v/ Onnu Kirstin og Thomsas Thomsen við einari ætlan um at gera ungdóms og mentunarhús. Fundur hevur verið ímillum fólk frá býráðnum og tey hjá Thomsen, vónandi kann hettar gerast veruleiki um nøkur ár.

Seyður úr býnum

Eitt av hjartamálunum hjá mær, tá eg varð valdur í býráðið, var, at býurin skuldi verða fríur fyri seyð, men her má eg ásanna, at hettar hevur ikki eyðnast. Men eg kann upplýsa tykkum, at hendan ætlan er komin somikið langt uppundir land, at til komandi heyst, tað vil siga á heystið 2005, tá kemur ongin seyður aftur í býin, væl at merkja um sitandi meirilutið verður valdur aftur. Peningur er avsettur á figgjarætlani fyri 2005.

At enda vil eg takka mínum samstarvsfeløgum, bæði í samgongu og andstøðu fyri ógvuliga gott samstarv. Sjáldan hava brotasjógvarnir verði størri enn, at vit hava lagt teir í sátt og semju. Somuleiðis vil eg takka umsitingini, og øllum, ið arbeiða hjá Tvøroyrar býráð fyri gott samstarv, umframt øllum borgarum í sóknini.

Velji fólk, ið hava dirvið og áræðið, ið kunnu taka avgerðir bæði í ódn og í logn.

Gott val.

Hesum vil eg arbeiða fyri

Jóhan M. Stenberg
Valevni Sjálvstýrisfloksins í Suðurstreymoy

VAL04

Góðu veljarar

Eg skal her taka fram, nøkur mál, ið vit vilja arbeiða fyri.

Fólkaskúlin

Sjálvstýrisflokkurin sær, at nógvar nýggjar íløgur mugu gerast í okkara skúlabygningar.

Flestu skúlarnir mangla pláss til at undirvísa í, tí mugu nýggjir bygningar gerast og teir gomlu útbyggjast.

Argja skúli virkar í løtuni í tveimum, nakrir flokkar á posthúsinum á Argjum og restin í gomlu skúlabygning-unum niðri við Argjavegin.

Longu tá ið eg gekk í Argja skúla, tosaðu fólk um, at skúlin var ov lítil, og at ynskiligt var at útbyggja skúlan. Síðani tað hava vit havt nógvar ymiskar støður. Einu tíðina gekk 10. flokkur í AB-húsinum fyrrapart, og seinnapart niðri á Argjum. Seinni aftur, hevur róðrarneystið á Argjum hýst 10. flokki. Ein lappaloysn fyri og onnur eftir. Ov lítil vilji hevur verið, til at skapa eina varandi loysn.

Sjálvstýrisflokkurin og eg, vilja í samstarvi við skúlan, finna eina loysn, ið kann nýtast.

Eisini inni í Havnini sita næmingar sum sild í tunnu, Eisini her má ein góð loysn finnast, sum kann halda langt fram í tíðina. Tað skal útbyggjast, men tað skal gerast við skili.

Hoyvíkin er í støðugum vøkstri, so har verður eisini neyðugt at byggja út.

Ítróttin

Sjálvstýrisflokkurin fer at arbeiða fyri, at hvør einstakur borgari í kommununi kann íðka sína ítrótt.

Málið er, at Tórshavn gerst fyrimyndin fyri, hvussu væl kommunan eggjar feløgum og ítróttarfólkið til at menna um ítróttina, tí ítróttin er við til at økja um trivnaðin og fólkaheilsuna hjá borgarum okkara.

Tað skal vera so, at kommunan gevur øllum ítróttargreinum ans, og er við til at hjálpa feløgunum, við at skapa karmarnar um virksemi teirra.

Javnsetan av feløgunum. Ítróttarfeløgini er vorðin nógv fleiri í tali, síðani kommunusamanleggingar komu upp á tal, og er tí neyðugt at lurta eftir ynskjum frá øllum feløgum, og ikki bara teimum, sum søguliga hava virkað longst í kommununi.

Her eru nøkur uppskot til, hvat skal gerast tey næstu fýra árini.

Fótbóltsvøllur eigur at verða gjordur í Hoyvík við rennibreyt rundanum.

Við fótbóltsvøllin á Argjum skulu ljós setast upp í niðara borði og áskoðarapláss gerast í ovara borði av vøllinum, við minst 300 sitiplássum, og ein ítróttarhøll í samband við vøllin.

Svimjihylurin í Gundadali má útbyggjast við einum hyli aftrat og einum baðilandi.

Onnur mál:

Ringvegurin út á Argir skal gerast liðugur og íbindast til vegin niðan á Hamaran, og ein gongubreyt má gerast.

Eldraøkið: Tørvurin á stovnsplássum skal nøktast. Eldrasambýli eigur at verða gjørt á Argjum.

Tað skal verða lætt at flyta í minni íbúð tá fólk gerast eldri.

LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

OPEL ASTRA 1.6
Árg. 98, koyrt 54500 km, sera væl hildin. Biliga til sølu.
Tlf. 220549

TIL SØLU
Óbrúkt vetrardekk av merkinum Bridgestone, stødd 185/65 R14. Dekkini eru á felgum, og passa til Toyota Carina E. Søluprísur 2.000 kr.
Tlf. +45 22808222

FELGUR TIL SØLU
17" AEZ, Icon5 felgur til sølu. Á felgunum eru Pirelli dekk, stødd 195/40 R17. Hava koyrt ca. 2000 km, og eru frá mai mánaði. Passa til Pegeot 306. Seljast fyri 7500 kr. Nýprísur 15.000 kr.
Tlf. +45 22808222

FORD SIERRA 1.8 TD
árg. 01/07/92 bláur diesel bilur. Hevur góð heilársdekk. Sýnaður 05/2004. Til sølu fyri 40.000 kr. ella hægstbjóðandi.
Tlf. 504785, Toftir

TOYOTA LANDCRUISER
3.0 TD, árg. 12/1997 til sølu um hóskandi boð fæst. Bilurin er nýsýnaður og er lakeraður í 2002. Hann hevur koyrt 140.000 km.
Tlf. 318460

TIL SØLU
Mazda 6 sær út sum nýggjur, hevur koyrt 11.000 km, frá aug. 2003. Hevur sportfelgur og cd-spælara.
Tlf. 210207

4 PÍKADEKK
so gott sum nýggj, 175/70-14 á felgum, sum passa til VW, Passat, Polo, eru til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 741225

4 PÍKADEKK Á FELGUM
Passa til Nissan Cherry og aðrar bílar, til sølu fyri 1.600 kr.
Tlf. 741225

SUZUKI SVIFT
Árg. 90 til sølu fyri 14.000 kr.
Tlf. 218778

PÍKADEKK
4 nýggj, 2 brúkt og 4 felgur til sølu. Stødd 175/70 R14.
TLF: 310757/269426

PRIMERA TIL SØLU
Nissan Primera 2,0 4 h, árgang 90, biliga til sølu.
Tlf. 564040

YNSKIST
Toyota Camry árg. 88 til eykalutir.
Tlf. 270953

AUDI 100 TIL SØLU
árg. 87, heilgalvaniseraður, koyrt 135.000 km. Vælhildin, bert ein eigari. Staðið í garasju. Ikki roykjara bilur. 4 pikadekk á felgum fylgja við.
Tlf. 317862/281612

PÍKADEKK TIL SØLU
Fýra píkadekk (175/65-14) tvey púra óslitin og tvey lítið slitin, á felgum til Opel Astra, til sølu fyri 1800 kr.
Tlf. 443329

TOYOTA AVENSIS
2.0 TD til sølu, árg. 99, væl viðfarin.
Tlf. 373781/257381

DEKK TIL SØLU
Eitt sett av góðum Nokan summardekkum, 205/65 R15, til sølu fyri 2.000,- kr.
Tlf. 510153/250824

FELGUR
Fýra felgur til Volvo S40/V40 við skálum til sølu fyri 1.500 kr.
Tlf. 316535/216535

PÍKADEKK TIL SØLU
4 góð píkadekk til sølu. Brúkt ein vetur. Eru á felgum við 4 holum, passa til Toyota. Dekkstødd 175/65 R14.
Tlf. 501145

FIAT TIPO
árg. 90, koyrt 99.000 km, er í sera góðum standi, til sølu til hægstbjóðandi.
Tlf. 226554/371301

FORD FIESTA 1.3i
árg. 12 í 95, koyrt 61.000 km, er dektylaður og er sum nýggjur.
Tlf. 220425

GOLF VR6
2.8i 180 HK, árg. 92 í góðum standi, sera biliga til sølu. Ring og gev eitt boð.
Tlf. 220511

4 PÍKADEKK VIÐ FELGUM
Stødd 145 R 13 740, brúkt 2 mán. til sølu fyri kr. 2.000.
Tlf. 508531

TOYOTA COROLLA TIL SØLU
vælhildin, nýsýnaður, árg. 12/1988. Koyrt 100.000 km, silvurlittur.
Tlf. 447609

EYKALUTIR
til Ford Escort, árg. 88, heilur bilur ella deilir av. Dømi: hurðar, sportfelgur, spoylari, setur og mangt annað fyri spottprís.
Tlf. 210560

HYGG HER!
2 summardekk 185/65 R14 ný. 2 heilársdekk 175/65 R14 ný. 2 heilársdekk 175/70 R14. 4 felgur 5 hol Toyota Hiace árg. 89. 15" og 4 dekk 195/65 R15 til sølu.
Tlf. 210560

BÍLIGA TIL SØLU
Deilir til Toyota Lite Ace bíliga til sølu. Dømi: startari, dynamo, lyktir, akkumolatorur, forkúf. 4 felgur, 4 heilársdekk, 2 summardekk 14''.
Tlf. 210560

TIL SØLU
4 píkadekk bíliga til sølu, stødd 155/80/13, eru brúkt ein vetur. 1.000 kr. og 2 stk. brúkt kavadekk, Bridgestone 175/65/R14 fyri 300 kr.
Tlf. 251428

YNSKIST
Ein kølari til ein Toyota Corolla diesel ynskist fyri ein rímiligan prís.
Ring á 212739 kl. 12–18

VOLVO 760 GLE
árg. 1988, motorur: 2.8 aut. gear, bensin, bilurin er svartur og sproytaður fyri einum ári síðani, inntrekk grátt leður, í sera góðum standi, til sølu fyri 60.000 kr.
Tlf. 224390

VW TRANSPORTER
árg.1990 koyrir væl men krevur ábøtur, hevur nr. plátur, góður til eykalutir. til sølu fyri 3000 kr.
Tlf. 224390

HYUNDAY ELANTRA 1.5 GLI
árg. 92, nýsýnaður við radio, cd-spælara/box 20.000 kr.
Tlf. 224910

TOYOTA CARINA II 2.0i
árg. 91, sýnaður 05/04, bilurin er í góðum standi, verður seldur vegna flyting. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 448745/271373

PÍKADEKK
4 dekk, 205/16 til sølu.
Tlf. 449251/749251

TIL SØLU
Blá/violettur Toyota Celica 2.0 GTs, árg. 89, koyrt 160.000 km, hevur el-sóltak, el-rútar, el-spegl, 17" alufelgur, senkaður 40 mm.
Tlf. 252356, Jógvan

VW TRANSPORTER
Dupult kabina og last, TD, árg. 87, til sølu. Gev eitt boð.
Tlf. 503797

PÍKADEKK Á FELGUM
til sølu, stødd 175/70 R13 fyri 1.500 kr.
Tlf. 255279

TOYOTA LANDCRUISER
BJ73 í góðum mekaniskum standi, spæl framman, selist heilt biliga, nógvir eykalutir fylgja við.
Tlf. 332025/214025

Amboð

VIÐFESTISVOGNAR
Tredal vognar, við spiral fjaðrum til sølu. Ein er á goymslu. Kunnu síggjast á heimasíðu www.tredal.no
Todal-Velbastað, tlf. 218101

VARIANT VIÐFESTISVOGNAR
til sølu, fleiri model á goymslu.
Kaj Andreasen & Co, tlf. 315600

BLANDIMASKINUR OG TRILLUBØRUR
Tilboðsprísur í november.
Kaj Andreasen, tlf. 315600

Arbeiði

HJÁLP
Vit eru tvær gentur, 18 og 19 ára gamlar, sum søkja vaskiarbeiði skjótast gjørligt. Ält hevur áhuga.
Tlf. 314451

ROYNDUR FISKARI
við línu, 20 árs erfaring søkir tjans.
Tlf. 584567/318401

FLISEARBEJDE
Pensionist søger mindre indendørs flisearbejde
tlf. 314434

ARBEIÐI YNSKIST
Alt hevur áhuga. Eg eri 24 ára gamal og búgvi í Tórshavn, havi royndir innan timburarbeiði o.s.fr. Havi koyrikort til vanligan bil og til trukk. Ring á
tlf. 509309/317109

RUKO LÁSATÆNASTA
Vit bjóða nú okkara serkonu Ruko lásatænastu, alt samdøgrið og allastaðni har brúgva- og tunnilsfast er. Eisini hava vit góðkenda systemtænastu til øll virki og stovnar. Lat okkara lásasmið koma út at gera arbeiðið fyri tygum.
Valdemar Lützen byggibúð, tlf. 301020

ALT TIMBURARBEIÐI
málaraarbeiði, tapetsering verður gjørt av handverkarum.
Tlf. 224417

SKULU TIT HAVA
veitslu, jólaborðhald o.a., so hava vit eina fjølbroytta matskrá, har vit bera út, og kunnu eisini veita servering um tað ynskist. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 504727

EG ÀTAKI MÆR
at polera, bona og reinsa bil innan, sum uttan.Ring og frætt nærri
Tlf. 256495

Barnaútgerð

BILBARNASTÓLUR
9-18 kg. til sølu fyri 550 kr.
Tlf. 317564

TIL SØLU
Ljósagráur barnavognur við madrassu, kurv, regnslagi, fluguneti, kodda og dúndýnu. Vinyl puslibørði við baðikari, biliga til sølu.
Tlf. 451050

FISHER PRICE
Baby Fitnesscenter (nýtt) við tónleiki til sølu fyri kr. 250
Tlf. 522120

GRULVIGARÐUR
Ér tað nakar, sum hevur ein grulvigarð at selja okkum.
Tlf. 374013/227580

RIMASONG
Antiklitað barnasong v/ góðari madrassu, dýnu og songjarrond til drong og gentu, til sølu fyri 1000 kr.
Tlf. 317606/226298

BABY ALARMUR
Philips baby alarmur til sølu fyri 300 kr. Rokkur 300 m. er lítið brúktur.
Tlf. 317606/226298

Bátaútgerð

38 FÓT v/ FISKILOYVI 5B
glastrevjabátur 10.7 x 3.95 m. árg. 93, moturur Cat. 670 HK. Niðursettur á 500 HK, árg. 2002, koyrt 2600 t. Vanlig nautisk útgerð. 4 nýggjar el-snellur. Til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 220205

M/B NESTINDUR
Bíliga til sølu, uttan fiskiloyvi.
Tlf. 221519

25 FÓT SKJÓTTGANGANDI
bátur til sølu. 200 HK Volvo Penta, 24 fjórðingar radara, ekkolod og fiskiloyvi.
Tlf. 371934/211934

PLASTJOLLA TIL SØLU
Longd 4,6 m. x br. 1,5 m. við 3,5 HK Yamaha leysamotori, árar, varp og 3 bjargingarvestar. Jollan stendur við bátahylin á Argjum.
Tlf. 318569/262250

RUSTFRÍ
egningartrakt av mekinum »Beitir« til sølu fyri 15.000,- kr. Við fylgja 42 av styttru stokkunum sum taka ca. 260 húkar og 42 kør til linu.
Tlf. 220422

Bingo

FRÁ SPASTIKARAFELAGNUM
Gott Bingo verður í Pálsstovu mánakvøldið 8/11 kl 19.00. At vinna m.a.dunnur og karramellur, full pláta 400 kr á lutaseðli m.a. 2 gávukort á 500 kr og tvey á 1000 kr. Drigið verður millum spølini, eyka spæl, koyring heim. Øll er hjartaliga vælkomin.
Spastikarafelagið

GOTT JÓLABINGO
verður í Róðraneystinum á Argjum hóskvøldið 11. november kl. 19. Nógvir góðir vinningar, millum annað karamellur, føroyskar gæs, føroyskt krov og nógv annað gott. Eykaspæl. Koyring heim. Øll eru hjartaliga vælkomin.
AB-stuðlar

BINGO
verður í Bygdarhúsinum í Kollafirði leygardagin 13. nov. kl. 16.00.
KÍF

BINGO
Verður í Mettustovu mánakvøldið 8. nov. kl. 19.00
Kvinnufelagið

GOTT BINGO
verður í Pálsstovu leygardagin 6. november kl. 15. Nógvir góðir vinningar.
Astma- og Allergifelagið

BÁRUBINGO
Stórt bárubingo verður í Skálanum mánakvøldið 8. nov. kl. 19.30. Føroysk gás verður at vinna til fulla plátu. Hevuðsvinningar, 5 føroysk krov. Eisini vera teir 103 abc vinningarnir drignir.
Bygdarfelagið Báran

KAGGIN
Gott bingo verður fríggjakvøldið 5. nov. kl. 20.00. Vinningar m.a. ræst kjøt úr Dímun, lundar, góðgætiskurvar o.a. 6. og 12. spæl gávukort á 1.000,- Burturlutað verða m.a. 5 gávukort á 1.000,- Eisini verður spælt bingola minibingo o.a.
Kaggin

FRÁ EYDNUNI
Gott bingo verður sunnudagin 7. nov. kl. 16.00. Hevuðsvinningur gávukort frá Smyril Line á 2.000 kr. Eykaspælið 2.000 kr. Drigið verður millum spølini.
Eydnan

BINGO
verður í Pálsstovu sunnudagin 7. november kl. 16.00. Full pláta 500 kr. Á lutaseðli ein Apex flogferð. Bingola, eykaspæl, koyring heim.
Kiwanisfelagið Rósan

GOTT BINGO
verður í Glæmuni í Kvívík mánakvøldið 8. november kl. 19. 12 plátur 100 kr.15 vinningar á lutaseðli. Drigið verður millum spølini.
Glæman

Bøkur

ER TAÐ ONKUR
sum eigur "I form"-bloðini frá 2002, 2003 og 2004.
Vinarliga ring 522120

Burturm. /funnið

FARTELEFON BURTURMIST
í vikuskiftinum miðskeiðis í oktober mánaða misti eg fartelefonina hjá mær burtur á Tvøroyri. Fartelefonin er ein grá Panasonic. Um nakar veit um hesa, vinarliga ring á
tlf. 455508 eftir kl. 18.00

UR BURTURMIST
Eg misti mítt ur burtur í Tórshavn fyrst í sept., veit ikki hvar. Urið er fýrakantað, gull við silvurstriku ígjøgnum reimina, merkið er Citzen. Vinarliga ring
tlf. 318554/263046

Býli

ÍBÚÐ Á ØYRASUNDSKOLLEGIINUM
í Keypmannahavn til framleigu frá 22. des. 04 til 01. feb. 05. Hevur allar hentleikar og liggur tætt við Metro, innkeypscentur og miðbýin.
Anna, tlf. (+45)32886912
ella (+45)61710670

ÍBÚÐ/KAMAR
ynskist til leigu í Tórshavn, Runavík ella nærhendis sum skjótast.
Ring á tlf 271376 helst eftir kl. 18

HÚS/ÍBÚÐ YNSKIST
Par við tveimum børnum ynskir hús/íbúð til leigu í høvuðsstaðarøkinum í seinasta lagi 1. jan. Vit eru eitt par við 2 børnum.
Teldupostur slp-bn@post.olivant.fo
Tlf. 322325 / 548020

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør ❑ Amboð ❑ Arbeiði
❑ Barnaansing ❑ Barnaútgerð ❑ Bátaútgerð
❑ Bingo ❑ Bræva skifti ❑ Burturm./funnið
❑ Býli ❑ Bøkur ❑ Dansur
❑ Dýr ❑ Fundir ❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv ❑ Lutaseðlar ❑ Leikur
❑ Matur ❑ Pløgg ❑ Samband
❑ Súklur ❑ Teldur ❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp ❑ Ymiskt ❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12⁰⁰, t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar. Sosialurin tekur ongan ábyrgd av møguligum villum.

Sent hevur:

Navn:…….

Bústaður:……

Bygd/býur:……

Tlf.: ……...

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki